# Kærkomið høvi at uppliva ungdómsmentan

**Kári Jacobsen, tónleikaprodusari, hevur verið og lagt teimum ungu á mentanarstevnuni lag á innan tónleik. Kári heldur, at hetta er eitt positivt tiltak, sum er eitt kærkomið høvið at fáa at vita eitt sindur um, hvussu tey ungu í Føroyum eru í dag**

UNG Í FØROYUM
*Ingrid Bjarnastein*

Ein verksmiðja á mentanarstevnuni, Ung í Føroyum 2003, snúði seg um tónleik. Her hevði Norðurlandahúsið fingið fatur á Kára Jacobsen, produsara og tónasmiði.

– Grundin til, at eg valdi at siga ja er, at eg haldi, at hetta er eitt ógvuliga positivt tiltak, sum eg ynski at stuðla. Eg hevði ynskt, at vit høvdu havt eina slíka stevnu tá eg var ungur. Hetta er eitt lítið land, so tær fáu góðu kreftirnar sum vit hava skulu jú brúkast, sigur Kári Jacobsen.

Seks ung fólk vóru á tónleikaverksmiðjuni um vikuskiftið. Har hava tey fingist við at smíða løg, og eisini hevur samarbeiðið við skriviverksmiðjuna verið á skránni, tí tey hava skriva tekstir, sum tónleikaverksmiðjan hevur gjørt løg til.

– Eg kenni hetta eitt sindur sum eina ábyrgd at vera við, men hugurin er eisini góður. Hetta er eitt kærkomið høvið at síggja, hvussu tey ungu í Føroyum eru í dag, heldur Kári Jacobsen.

Uppgávan hjá Kára er fyrst og framst at leggja lag á, og vegleiða teimum ungu. Tað eru jú tey sjálvi, sum skulu finna teirra kreativu evni.

– Eg skal hjálpa teimum við at úttrykkja seg og annars bara vera ein vanligur tónleikalærari. Tey eru ógvuliga fitt og engagerað og ógvuliga stuttlig at arbeiða við, sigur Kári, sum heldur, at sjálvt um støðið er ymiskt, so er hugurin heilt vist til staðar.

– Ein slík stevna gevur nógv. Tað er ymiskt, hvat tey fara at brúka tað til. Nøkur av teimum gerast kanska yrkistónleikarar, og hetta kann vera eitt skump tann rætta vegin. Men eisini til teirra, sum ikki gerast yrkistónleikarar, er hetta við til at styrkja teirra sjálvsálit, og at vinna ein persónligan sigur, av tí at hetta er nakað, tey skulu tora.

Kári heldur, at á persónliga munnu tey ungu heilt vist mennast, men reint fakliga er tað ógvuliga avmarkað, hvat hann megnaði at læra tey uppá eitt vikuskifti.



*Kári Jacobsen, produsari og tónasmiður, legði um vikuskiftið lag á hjá teimum ungu, sum høvdu tónleikaverksmiðjuna á ungdómsmentanarstevnuni uppi í Norðurlandahúsinum*
*Mynd: Finnur Justinussen*



*Tey ungu smíðaðu løg og spældu av lívsins kreftum á tónleikaverksmiðjuni. Tekstirnar til sangirnar fingu tey frá skriviverksmiðjuni*
*Mynd: Finnur Justinussen*

## Kreativt og nýtt

**Jákup Veyhe, videoverksmiðjuleiðari, heldur, at í eini videoverksmiðju kemur tað kreativa og tað nýggja fram**

UNG Í FØROYUM
*Ingrid Bjarnastein*

– Í løtuni sita vit og arbeiða við einum manuskriptið. Vit gera eina leypandi forteljing, har tey sleppa at gera storyboard og taka upp so hvørt, og nú royna vit so smátt at fara til verka, sigur Jákup Veyhe, tá Sosialurin fekk orðið á hann tíðliga seinnapartin legyardagin.

Á videoverksmiðjuni sita tey og tekna upp, hvat tey vilja hava, og hvør søgan skal vera.

– Tey eru ógvuliga fitt, og tað er stuttligt at arbeiða saman við teimum. Tey ungu eru óspilt, og ofta hava tey eisini eitt nógv betri sjónarhorn enn tey, sum hava lært í fleiri ár, sigur verksmiðjuleiðarin, sum heldur, at á eini slíkari stevnu sleppur tað kreativa og tað nýggja fram í ljósið.

– Tey gera bara tað, sum tey eru biðin og tey spyrja ikki so nógv.

Tá dagarnir vóru lidnir høvdu tey á videoverksmiðjuni framleitt ein skemtikrimifilm, sum varð sýndur fram sunnukvøldið.

# Einsamallur hani millum allar hønurnar

**Rógvi Dam, sum er 16 ár og av Argjum er ein av luttakarunum, sum var við á dansiverksmiðjuni hjá Peter Friis á mentanarstevnuni »Ung í Føroyum 2003«. Hann er einasti drongur, sum var við á dansiverksmiðjuni**

UNG Í FØROYUM
*Ingrid Bjarnastein*

– Eg helt, at ein dansiverksmiðja ljóðaði spennandi og áhugaverd, og tí vildi eg fegin royna at vita, hvat tað var. Mær dámar væl, men tað er ógvuliga rint at læra teir ymsu dansirnar, heldur Rógvi Dam, sum leggur afturat, at hann hugsar ikki um, at hann er einsamallur hani ímillum 16 aðrar hønur.

Rógvi sigur, at hann hevur dansað einaferð tá hann var lítil, men hevur annars ikki fingist við dans.

– Hetta er nakað nýtt fyri meg, og tað er ógvuliga stuttligt. Eg havi ongantíð roynt tað fyrr.

Orsøkina til, at Rógvi valdi at luttaka á mentanarstevnuni sigur hann vera, at tað komst av, at eitt bræv frá Norðurlandahúsinum varð borið út á skúlarnar.

– Eg gangi eisini til drama frammanundan, so eg og tvey onnur gjørdu av at tekna okkum saman sum ein bólk, greiðir Rógvi frá, sum til pallframførslurnar fríggjakvøldið framførdi ein sjónleik saman við nøkrum øðrum.

Rógvi heldur, at tað eru nakrar ávísar kenslur í drama og dansi, sum eru eins. Nakrar kenslur, sum tú vísir fyri áskoðarunum.



*Rógvi Dam var einasti drongur, sum var við á dansiverksmiðjuni um vikuskiftið. Men hann smæddist sanniliga ikki burtur ímillum hinar 16 luttakararnar, sum allar vóru gentur*
*Mynd: Finnur Justinussen*



# Hitta nýggj fólk

**Tær tríggjar, Jónva, Helga og Heidi eru allar úr Vágunum. Vágagellurnar hava luttikið á kórverksmiðjuni undir leiðslu av Bjarna Restorff um vikuskiftið. Teimum dámdi bara væl**

UNG Í FØROYUM
*Ingrid Bjarnastein*

– Vit halda tað er ógvuliga stuttligt. Tú lærir, hvussu tú skalt brúka luftina, og at syngja í stemmum, siga tær tríggjar, Jónva, Helga og Heidi, sum eru úr ávíkavist Bø og Sørvági.

Tær eru allar 14 ára gamlar, og hava um vikuskiftið luttikið á tónleikaverksmiðjuni undir leiðslu av Bjarna Restorff á mentanarstevnuni Ung í Føroyum.

– Í morgun hava vit hitað nógv upp, og lært eitt nýtt lag. Vit hava fingið tekstir frá teimum, sum eru á skriviverksmiðjuni, sum ríma og alt, siga tær tríggjar við einum smíli.

Orsøkina til, at tær hava valt at fara á mentanarstevnuna siga tær vera til stuttleikar og fyri at koma at hitta nýggj fólk og royna okkurt nýtt.

– Vit meldaðu okkum til dans, men tann verksmiðjan var full, so vit endaðu í kórinum, men tað ger nú heldur onki, siga tær tríggjar at enda.



*Tær tríggjar, Jónva, Helga og Heidi úr ávíkavist Sørvági og Bø, hava luttikið á kórverksmiðjuni hjá Bjarna Restorff um vikuskiftið. Teimum dámdi væl at vera við á stevnuni*
*Mynd: Finnur Justinussen*

## Væl nøgd

**Nú ungdómsmentanarstevnan er liðug og afturlatin, siga fyrireikararnir, at tær eru einastandandi væl nøgdar við úrslitið**

UNG Í FØROYUM
*Ingrid Bjarnastein*

– Vit eru væl nøgdar. Góðskal hevur verið heilt ótrúliga góð á hesi stevnuni, sigur Rakel Helmsdal, projektleiðari. Hon leggur afturat, at støðið er farið yvir allar væntanir.

– Tað var gott seinast, men tað var uppaftur betri hesuferð.

Eisini verksmiðjuleiðararnir vóru væl nøgdir við úrslitið. Øll eru bilsin av tí, sum tey ungu hava framleitt hesar fáu dagarnar.

– Hesuferð hava vit eisini havt ótrúliga nógv samstarv millum allar verksmiðjurnar. Tað var eisini seinast, men í nógv størri mun hesuferð, so tað hevur riggað fantastiska væl, sigur ein vælnøgdur fyriskipari.



# Annlis verndari

Annlis Bjarkhamar, landsstýriskvinna í Mentanarmálum, var verndari fyri ungdómsmentanarstevnuna. Hon fekk til endaframførsluna eitt luttakaraprógv, sum var eitt navnaskilti við einum bandi við litunum av føroyska flagginum.

**ib**



*Annlis Bjarkhamar avmyndað frammanfyri myndum, sum tey ungu á mentanarstevnuni, hava framleitt*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Verksmiðjur og leiðarar

Seks ymsar verksmiðjur vóru á »Ung í Føroyum 2003«. Ætlanin var annars at hava eina sjeyndu verksmiðju, sum var sjónleikur fyri rørslu- og menningartarnað, men av tí at ongin meldaði seg til, var hon tikin av skránni.

Verksmiðjurnar, sum tey ungu hava luttikið á í ár vóru sostatt:

Kórverksmiðja við Bjarna Restorff
Dansiverksmiðja við Peter Friis
Videoverksmiðja við Jákupi Veyhe
Skriviverksmiðja við Marionnu Debes Dahl
Myndlistaverksmiðja við Karstin Olgar Lamhauge og Guðrið Poulsen
Tónleikaverksmiðja við Kára Jacobsen

### Fakta

- Ung í Føroyum var á fyrsta sinni í 2001, hetta er sostatt onnur ferðin mentanarstevnan er á skránni
- 60 ung úr øllum Føroyum í aldrinum 13 – 18 ár luttaka á stevnuni
- Óvist er nær stevnan aftur verður. Fyrireikararnir ynskja, at hon ikki fellur aftur saman við Prix Føroyum, sum hon gjørdi í ár, so enn er ilt at siga, nær næsta stevnan verður
- Hugskotseigarar og projektleiðarar eru Hedvig Westerlund og Rakel Helmsdal



*Christa Reynheim, sum er 14 ár, luttók á myndlistaverksmiðjuni á mentanarstevnuni um vikuskiftið. Her er hon í holt við at tekna, júst sum fleiri onnur, sum høvdu verið eftir spraydósum og øðrum. Nøkur heilt onnur stóðu og brongladust við »træið«.*
*Mynd: Finnur Justinussen*